Tórshavnar Býráð yvirtikið Marinustøðina:

# Dannebrog veittraði fyri seinastu ferð



Dannebrog varð vundið niður á Marinustøðini fyrrapartin í gjár...

**Fyrrapartin í gjár varð Marinustøðin hjá Færøernes Kommando alment latin í hendurnar hjá Tórshavnar Býráði. Nú skal Marinustøðin gerast til eina eldramiðstøð við trimum ymsum tænastum**

YVIRTØKA
*Orð: Ingrid Bjarnastein*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

Í summarveðrinum í gjár, sum kanska helst minti um ráligt og kalt heystveður, var ein bólkur av fólki savnaður uttanfyri Marinustøðina á Hoyvíksvegnum. Hetta komst av, at í gjár var Marinustøðin alment latin í hendurnar á Tórshavnar Býráð, sum keypti hana fyri einum ári síðani.

Jesper Dinesen, kommandørur, greiddi fyrst eitt sindur frá Marinustøðini.

– Fólk hjá Færøernes Kommando hava arbeitt her í næstan 40 ár, so tað er við ikki sørt av sorgblídni, at vit fara herfrá. Vit vóna tó, at Marinustøðin kemur at vera til eins stóra gleði fyri býráðið, sum hon hevur verið fyri okkum, segði Jesper Dinesen millum annað.

Kommandørurin gav síðani lyklarnar víðari til stjóran í Forsvarets Bygningstjeneste, Bent Frank.

Eftir, at Bent Frank hevði sagt nøkur orð, gav hann lyklarnar til nýggju eigararnar, nevniliga Jan Christiansen, borgarstjóra.

## Eldramiðstøð

Tá handanin var liðug, var danska flaggið, Dannebrog, vundið niður av flaggstongini, og flaggið hjá Tórshavnar Býráð vundið í húnar hátt. Ein tekin um, at nú er Marinustøðin ikki longur á donskum hondum.

Býráðið fer í næstum undir smærri umbyggingar, sum skulu gera Marinustøðina, sum vit kenna hana, til eina eldramiðstøð við trimum ymsum tænastum.

– Talan er um eina dagmiðstøð, har dement kunnu verða í dagtímunum, sum ein lætti hjá teimum avvarðandi. Soleiðis kunnu tey, ið eru lættari dement, men framvegis vilja búgva heima, verða her um dagin, sigur Jan Christiansen, borgarstjóri.

Næsta tænastan verður eitt umlættingarheim. Her verður pláss fyri níggju persónum í longri ella styttri tíðarskeið, men ætlanin er ikki, at nakar skal verða fast á umlættingarheiminum.

– Umframt umlætting í dagtímunum og umlætting í eina tíð, bjóða vit eisini eina uppvenjingarmiðstøð. Hon verður fyrst og fremst fyritey, ið eru í umlætting. Harafturat síggja vit alt ov ofta, at tey eldru verða útskrivað av sjúkrahúsinum alt ov tíðliga, og tí koma tey ongantíð rættiliga fyri seg aftur. Og hetta skal uppvenjingarmiðstøðin eisini nýtast til, soleiðis, at tey eldru kunnu koma fyri seg aftur, greiðir borgarstjórin frá.



... og ístaðin var flaggið hjá býráðnum vundið á húnar hátt

## 8000 m²

Grundøkið við Marinustøðina er um 8000 m2. Peningur er lagdur av í ár til at byrja umbyggingarnar, sum tó ikki vera tær heilt stóru.

– Tað skal ikki byggjast so nógv afturat, sigur Jan Christiansen, borgarstjóri.

– Vónandi verður byrjað uppá hetta arbeiðið longu í ár, tí peningur er settur av til hetta.

Borgarstjórin væntar, at tað møguliga verður klárt einaferð komandi ár.

Býráðið keypti Marinustøðina fyri 14 milliónur krónur, sum Jan Christiansen metir vera ein góðan prís fyri kommununa.



Jan Christiansen, borgarstjóri og Bent Frank, stjóri á Forsvarets Bygningstjeneste, fegnast um góða samarbeiðið millum kommunu og Færøernes Kommando





*Høvdingar hittast. Frits Johannesen og Hans Jákup Glerfoss, báðir listamenn fingu eitt gott prát uttan fyri nýggja mentanarhúsið í Fuglafirði leygardagin. Her er tað Frits, sum greiðir Hans Jákupi frá listaverkinum hann hevur gjørt og sum prýðir ein av veggjunum á mentarnarhúsinum*
*Mynd Jan Müller*

# Mentanarhúsið í Fuglafirði tikið í nýtslu

HUGLEIÐING
*Frits Johannesen*

1987 var mentanarstevna í Fuglafirði, sum LISA tók stig til. Gunnar Hoydal var tá formaður í nevndini fyri Listasamband Føroya, og sendi hann ein fyrispurning til Fuglafjarðar bygdaráð, um hetta kundi lata seg gera at hava eina mentanarstevnu í Fuglafirði í febr. mánaði 1987?

Stentór Larsen var bygdaráðsformaður og Andrea Lervig var forkvinna í mentanarnevndini. Hugsi hetta var antin seint á heysti í 1985 ella fyrst í 1986. Kommunan (mentanarnevndin) setti ein fyrireikingarbólk. Ì bólkinum vóru m. o. Herluf Berthelsen, Frits Johannensen, Gunnar Hoydal og Andrea Lervig.

Henda nevnd fór til verka beinanvegin at finna útav, hvat kundi takast "undan væðingini í Fuglafirði, sum hevði mentanarligt virði," og seta hetta á eina rók saman við øðrum aðrastaðni frá, sum gav okkum eina hóming av, hvat var á teimum mentanarligu lygnunum í tí føroyska samfelagnum.

Skjótt sóu vit, at manna millum var ein hópur av tilfari, sum vert var at sýna fram. Vit ásannaðu skjótt, at tað, sum fólk áttu t. d. lutir o. a. hevði stórt mentanarligt virði. Hetta var fólksins ogn. Hetta var Grundtvík gamli í síni ond, sum reis úr grøv, meðan leikur fór fram: "Folkeligheden i folket." Ikki bert vóru tað lutirnir, men eisini hugskotini, sum fólk komu við, ið vit undraðust yvir. Her var ein megi í inn- og útsúði í bygdafólkinum, sum aldri áður var komin til sjóndar. Hetta vóru eydnuríkir dagar, har øll bygdin - øll skúlabørnini, gomul og ung, stovnar, sangkór, tónleikarar, sjónleikarar, leikur og lærdur góvu stevnuni íblástur, men eg má siga, at úrsýnt var hvussu miðlarnir tugdu hesa stevnu serliga Sjónvarpið. Um rætt varð borið at, hevði Sjónvarpið tilfar til ein heilan vetur av mentanarevnum, sum lýstu "kulturin" í einari føroyskari bygd. Har kom púrt einki burturúr, og harmaði hetta okkum í Fuglafirði, at høvuðsmentanardepil føroyinga sat og lavaði við veingjunum, sum dravin høna, tá ið fróðir fuglar sungu í mentanarrúsi í Fuglafirði. Hetta er farið, men spell var tað. Tað hevði verið tókt nú Mentanarhúsið læt upp, at endurskoða mentanarnævurnar frá hesum døgum.

Aftur til Svínoynna! Tá ið stevnan fór av barkastokki, var hetta gjørt í fimleikarhøllini. Meg minnist ofta undir hesari fyrireiking, at havt var á munni: Gott hevði verið, at vit fingu eitt bygdarhús, har ein ávís miðsavning kundi verið.

Nú er húsið reist og tikið í nýtslu. Niels Midjord til mikla tign. Hann er ein knassi og eisini øll hini, sum hava havt ein fingur við í spælinum til miklan sóma… og vælsignað verið hondin!

## Hugrensl

Møtti Hans J. Hansen - Hans J. á Brúnni (eldra) eitt várkvøld 1960 uml. týggju tíðina á veg heimeftir. Hetta var um tað mundi, tá ið Fuglafjarðar sjónleikarafelag spældi sjónleikin Systrarnar á Kynn. Studentar úr Havnini vóru komnir norður at vitja, og skuldu teir hava dans um kvøldið í Sjónleikarhúsinum. Spurdi Hans J. á Brúnni: "Hvar fara tygum so síðla?" - "Nei, hann fór heim í dansistovuna at hyggja at studentadansi, tað hevði hann aldri sæð áður!"

Hans J. á Brúnni var gamal útróðrarmaður, og eygu hansara høvdu sæð mangt og mikið, men studentadans hevði hann aldri sæð áður. Hann var á ferð elli gamal, og á ellisárum vildi hann eisini síggja hvussu studentarnir úr Havnini dansaðu. Leiðin gekk Heim á Sand, har sum Mentanarhúsið stendur í dag. Hann var ein trúgvur tænari… tú trúgvi og góði tænari far inn til gleði harra tíns…

Hann gekk ikki og mól uttanum, men var í miðum kringi alt sítt lív. Hann veiddi fisk á grunninum, innansyndis og við Íslands strendur, men studentadansur, tað mátti vera nakað serskilt. Hvat hevði Hans J. sagt í dag, nú Mentanarhúsið læt upp? Hann kendi hvønn plink á pollinum og hvørt loynimið í fjørðinum.

Hann, sum flestu føroyingar, kom úr smáum korum. Tað lítla, tað sum var smátt í alra eygum, gjørdi hann føran fyri at undrast, at leita, granska, undirsøkja og hyggja at tí, ið var eitt sindur øðrvísið. Sjálvandi vitsti Hans J., at hann var ikki sørur, tá ið tað galt hýsumurtin. Hann var eyðmjúkur, tá ið studentarnir komu norður til Fuglafjarðar at dansa. Møguligt var hetta nakað stórt, okkurt, sum var størri og matari enn tað, sum hann var vanur við.

Studentarnir dansaðu í Fuglafirði eina nátt, og Systrarnar á Kinn vórðu spældar bæði væl og virðisliga.

Her varð sjónleikur og dansur tvinnað saman í eina eind. Forvitnisliga lyndið hjá Hans J. á Brúnni gamla var í miðjuni í hesum kosmiska heimi, har íður og íðukálvar høvdu myndað mannin. Hann var eins forvitin, sum vit eru í dag.

Vit standa eisini í miðjum heimi, og flest av okkum eru komin úr sjómannastættini, har mentanin var eitt livandi fyribrygdi í tilveruni. Vit fóru eisini Heim (oman, norður) á Sand í henda glæsiliga skála at skoða hetta vala hús, og í forvitni at royna andan, ein livandi anda, sum vit vóna fer at búgva undir hesum bitum.

Her stóðu vit í miðjum vavi í tí tóma rúminum í tí nýggju høllini, sum er ein glæstriborg, sum Niels Midjord hevur teknað. Vit eiga at sláa ring kring hesa lon og lata lívsdansin ganga og fáa kvæðið undir fót, so tað verður eitt gott kvæði, ið gongur væl, so øll kunnu verða við undir bitunum!

Hans J. á Brúnni eldri undraðaðist. So gamal hann var, fór hann fet fyri fet heim eftir vegnum - væl nøgdur og mettur av døgum, men hann vildi síggja studentadansin, um hetta var nakað, sum hann kundi leggja afturat lívsál síni, ella vraka bert sum nakað lítilláta - ein lítil skygging í lívsins spunatráði, sum ikki var hansara, men kundi blíva tað!

Vit vilja eisini síggja og hoyra og seta fótafar okkara í lívssvørðin- fet fyri fet og endurspegla tað tóma rúmi, sum vit reika í. Hans J. á Brúnni var heilur og sælur, har hann var. Ynski og vón okkara er, at vit í okkara forvitni, okkara tráan, sjónum og huga fara fet fyri fet avstað í tí tóma umfarinum, sum hans J. á Brúnni var í. Hyggja og lurta eftir tí, sum fer at verða í Mentanarhúsinum.

Tann, sum æru býður, er æru verdur…. og at vit, tá ið okkara tímaglas er runnið kunnu fara inn til gleði harra várs í einum góðum studentavalsi.

**Frits**